umhvørvisstovan

Viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni til
Uppskot til "Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjøld við skráseting av motorakførum" og " Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)", viðvíkjandi hybrid-, plug-in hybrid- og ravmagnsbilum

Talvan niðanfyri er roknidømi fyri bil við CIF-virði 300.000 kr. Víst verður lætti í virðisgjaldi og mvg í trimum tíðarskeiðum. CO_2-gjald og burturbeiningargjald eru ikki tikin við, tá tey eru smá i mun til til virðisgjaldið og mvg.

		2021-23				2023-24				eftir 2025			
	CIF-virði	Virðisgjald	MVG	Samlað gjald	Lætti	Virðisgjald	MVG	Samlað gjald	Lætti	Virðisgjald	MVG	Samlað gjald	Lætti
Bensin/diesel	300000	200000	125000	625000	0	200000	125000	625000	0	200000	125000	625000	0
El / vetni	300000	0	5000	305000	320000	120000	40000	460000	165000	120000	105000	525000	100000
Plug-in hybrid	300000	120000	35000	455000	170000	120000	40000	460000	165000	120000	105000	525000	100000
Vanligur hybrid	300000	120000	105000	525000	100000	120000	105000	525000	100000	120000	105000	525000	100000

Tað sæst í døminum omanfyri, at elbilar fáa stóran lætta í mun til vanligar bilar, plug-in bilar og hybridbilar í tíðarskeiðinum 2021-23 (320.000 kr).
Plug-in hybridbilar fáa 170.000 kr í lætta og hybridbilar 100.000 kr í lætta.
Í tíðarskeiðinum 2023-24 er lættin tann sami fyri elbilar og plug-in hybridbilar(165.000 kr) og lægri fyri hybridbilar (100.000 kr).
Eftir 2025 er ongin mvg afturbering og lættin tí minni fyri øll trý bilasløgini.

Orkupolitikkurin
Endamálið við orkupolitikkinum er at skifta olju út við grøna orku allastaðni, har tað ber til. Amboðið er grøn elorka – serliga vindorka- og elektrifisering av orkunýtsluni. Næstu tvey árini kemur nógv nýggj vindorka í elskipanina, so nógv, at ofta – og serliga um náttina, verður yvirskot av grønari orku. Elbilar eru væl egnaðir at taka ímóti hesi orkuni, tí teir kunnu løðast um náttina.

Plug-in hybrid
Hesir bilar kunnu partvíst brúka elorku. Men teir brúka eisini partvíst olju, og eru tí ein forðing fyri í mun til ein elbil, at tann grøna elskipanin verður gagnnýtt optimalt.

Hybrid
Hybridbilar kunnu als ikki løðast við grønari orku og eru sostatt ikki ein aktivur partur av framtíðar grønu elskipanini.

Verðandi skipan við veggjaldi, sum er tengt at CO_2-útláti,er góð fyri allar bilar, sum koyra langt fyri hvønn litur av brennievni.
Hybridbilar eru ikki munandi dýrari enn vanligir bilar. Tað undranarvert, at hesir skulu fáa afturberingar, sum vanligir bilar, ið eisini koyra langt fyri hvønn litur av olju, ikki fáa.

Umhvørvisstovan mælir til, at hvørki hybridbilar ella plug-in hybridbilar skulu hava lætta í skrásetingargjaldi og mvg-afturbering og sostatt ikki fáa fyrimunir fram um vanligar bensin- og dieselbilar.
Nógv betri er at raðfesta elbilar framum, og heldur leingja tíðarskeiðið, har hesir fáa fyrimun.